## Minni vøkstur í Kina

Heimsbankin er ikki so bjartskygdur um gongdina í kinesiska búskapinum, sum hann hevur verið. Í einari nýggjari meting sigur bankin, at vøksturin í kinesiska búskapinum verður umleið 6,5 prosent í ár. Fyrr hevur bankin sagt, at vøksturin verður 7,5 prosent. Um orsøkina til tað minkandi bjartskygni sigur Heimsbankin, at eftirspurningurin eftir kinesiskum útflutningsvørum er minkaður. Hinvegin stúrir Heimsbankin ikki fyri teimum kinesisku bankunum, sum sambært metingini eru slopnir rættiliga snikkaleysir ígjøgnum fíggjarkreppuna higartil.



## Kanadiumenn ímóti Bush

Tað endaði við ófriði, tá fyrrverandi amerikanski forsetin George W. Bush vitjaði eitt oljuøki har vesturi í Kanada í gjár. Fleiri fólk møttu upp at mótmæla vitjanini. Tey lótu seg úr skónum og tveittu teir eftir fyrrverandi forsetanum. Løgreglan mátti leggja uppí, og trý mótmælisfólk vórðu tikin. Bush var boðin at halda fyrilestur á einari orkuráðstevnu í býnum Calgary, og hetta var hansara fyrsta almenna ferð, síðani hann fór frá. Umleið 1.500 fólk vóru og lurtaðu eftir Bush, meðan umleið 200 royndu at órógva vitjanina, skrivar AP.

# Umbyggingar órógva Landssjúkrahúsið

**Landssjúkrahúsið er farið undir drúgvar umvælingar, sum hava við sær, at deildir innanhýsis mugu flytast. Arbeiðið órógvar bæði starvsfólk og sjúklingar, men umvælingarnar eru so mikið umráðandi, at tær ikki kunnu bíða**

HEILSUVERK
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*



*Íslendska byggifyritøkan, TG Verk, er farin í holt við fyrireikingararbeiði til umvælingarnar á Landssjúkrahúsinum. Arbeiðið kemur at taka umleið hálvt ár í hesum umfari, og kunnu deildirnar rokna við at verða fluttar runt, meðan arbeiðið fer fram*

*Savnsmynd*

Tað bæði lekur og gísur á Landsjúkrahúsinum. Gamli bygningurin er ikki umvældur uttan síðan hann varð bygdur í 1960 árunum, og er tíðin tískil komin til at skifta vindeygu, klædning og tak. Íslendska byggifyritøkan TG Verk, ið skal fremja umvælingarnar, er farin í holt við fyrireikingararbeiði. Helvtin av arbeiðnum verður gjørt í ár, og helvtin komandi ár.

- Av tí at arbeiðið er so umfatandi, er avgjørt at flyta deildir hetta hálva árið, arbeiðið í hesum umfari fer at varða. Arbeiðið er so umfatandi, og hevur millum annað við sær at larmandi betongarbeiði skal gerast á Landssjúkrahúsinum, sigur Árni Winther, ráðgevandi arkitektur í umvælingararbeiðnum.

Millum broytingarnar eru flytingar av deildunum í B-bygninginum, sum verða fluttar í gomlu barakkina, har bert eygnadeildin í løtuni heldur til. Møguliga skulu nakrir sjúklingar flytast til Klaksvíkar eisini.

- Hetta er eitt ótrúliga viðbreki arbeiðspláss, við tað at arbeiðið rakar nógv starvsfólk, og har liggja nógv sjúk fólk, sigur Árni Winther.

### B4-B8 flytast

Allan Skaalum, sjúkrahússtjóri, ásannar at umvælingararbeiðið er so mikið umfatandi, at tað ikki verður møguligt við vanligum virksemi inni á Landssjúkrahúsinum. Tískil fer umvælingararbeiðið at merkja B-deildirnar, væntandi frá B4, har oyrna-, háls- og næsalæknin og tannlæknin heldur til, og upp á B8, har hjartasjúklingarnir liggja.

- Enn ber illa til hjá mær at vera ítøkiligur í hesum málinum, tí eg havi ikki fingið eina fullfíggjaða ætlan fyri hvussu arbeiðið skal fara fram. Men tað er sjálvsagt, at arbeiðið fer at hava við sær larmandi betongarbeiði, sum vit ikki kunnu bjóða starvsfólkunum yvir longri tíð, sigur Allan Skaalum.

Innan stutta tíð fer at bera til at siga, hvar tað fer at larma mest, og hvat skal gerast fyrst osfr. Støða skal takast til hvar byrjast skal. Um takið verður skift fyrst, síðan klædningur og vindeygu ella onnur mannagongd verður funnin. Við tað at klædningurin verður skiftur, skal bygningurin eisini bjálvast, og er ætlanin at oljunýtslan og harvið $CO_2$ útlátið eisini minkar.

- Ovastu hæddirnar í bygninginum skulu flytast, og tað inniber loysnir, ið ikki hava somu funktiónir sum vanligt. Vit fara at royna at finna so tryggar loysnir sum gjørligt. vit vilja hýsa so frægt vit kunnu innanhýsis, og møguliga verður neyðugt at flyta sjúklingar á hini sjúkrahúsini, sigur Allan Skaalum, sjúkrahússtjóri.

B-bygningurin á Landssjúkrahúsinum er 9.000 fermetrum til støddar, og samlaða gólvvíddin er 50.000 fermetrum undir taki.

Umvælingararbeiði er mett at kosta umleið 27 milliónir krónur.

# Mobilt miðbýarposthús

**Avgreiðslan hjá Posthúsinum í miðbýnum í Havn letur upp aftur í nýggjum hami við posttøku og kurér tænastu. Tíðin skal vísa, hvussu tænastan virkar, og hvørt tað verður brúk fyri avgreiðslu við diski inni á deildini**

POSTUR
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Deildin hjá Posthúsinum í miðbýnum í Havn, letur upp í nýggjum hami. Hon verður øðrvísi við tað at ein posttøka verður sett inn í avgreiðsluna, ið avgreiðir ørindini hjá viðskiftafólkum. Umvegis posttøkuna kunnu viðskiftafólkini senda brøv og pakkar, umframt at keypa frímerki. Onnur viðurskifti, so sum at gjalda við girokorti, fara fram á Suðuroyar Sparikassa.

Deildin í miðbýnum hevur verið afturlatin vegna umvælingar alt hetta árið, og nú er skriv komið upp at hanga í hurðini, um at posttøka er komin at avgreiða vanligu viðurskiftini. Harafturat ber til at ringja eftir kuréri, sum kemur heim at avgreiða viðurskiftini hjá viðskiftafólkinum. Tað kann gerast við at ringja 818181.

Sofus Clementsen, postverksstjóri, sigur at við hesum broytingum, roynir Postverkið at betra um tænastuna.

- Vit hava ongar ætlanir um at lata aftur, men at menna tænastuna við posttøku og kurér. Í staðin fyri at hava opið í avmarkaða tíð, ber til at avgreiða síni viðurskifti á posthúsinum alt samdøgrið, sigur Sofus Clementsen.

Postverksstjórin sigur, at miðbýardeildin er sentral fyri Postverkið, og at hon tískil roynir nýggjastu tøknina har. Tænastan við posttøku og kuréri hevur virkað í eina tíð kring landið, og serliga eru tað fyritøkur, ið gera brúk av hesi tænastuni.

- Hetta er ein broytingartilgongd, har vit skulu finna út av hvat brúkarin hevur brúk fyri. Í vár fara vit at kunna nærri um tænastuna, sigur Sofus Clementsen, postverksstjóri.




*Postverkið fer í gjøgnum eina broytingartilgongd. Ein posttøka og ein kurértænasta skal í fyrsta umfari avloysa avgreiðsluna, men samstundis skal tíðin vísa um tørvur er á fólki til avgreiðsluna*

*Mynd: Jens Kristian Vang*